M

TUR

» vit eru sera harmir um, at landsstýrismaðurin ikki heldur orð

JÓN RASMUSSEN



- Tey 2800 tonsini av makreli, sum lógu eftir hjá okkum í fjør, og sum vit tískil skuldu sleppa at fiska í ár, hava eitt avreiðingarvirði upp á einar 20 miljónir krónur. Men nú er landsstýrismaðurin vorðin firtin og vil einki gera, sigur Jón Rasmussen, skipari á Norðborg

Mynd: Dávur Winther

# Mistar miljónir

**LOYSN** Viberg Sørensen heldur, at løgmaður noyðist at loysa málið um føroysku makrelkvotuna fyri 2010, so okkara fiskifloti, sum nú hevur ligið bundin við bryggju í meiri enn ein mánaða, sleppur útaftur at fiska

Vilmund Jacobsen



FREKLEIKI

- Parturin, sum Føroyar vilja kanna sær av makreli, er ikki størri enn tað, sum skotar og es-menn viðganga, at teir tveita í havið aftur og annars yvirfiska á hvørjum ári, sigur Viberg Sørensen

Mynd: Vilmund Jacobsen

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, er nú av álvara farin at ótolnast í makrelspurninginum, sum enn liggur óloystur.

Á heimasíðu felagsins heldur hann, at neyðugt er at taka eina avgerð nú, og hann heitir á løgmann um at loysa málið.

Viberg Sørensen vísir á, at í meiri enn ein mánaða hava føroysk skip ligið klár til fiskiskap eftir makreli, og hann metir, at miljónaupphæddir verða mistar hvønn einasta dag, nú feløg framvegis bíða eftir eini avgerð um, hvussu fiskast skal í 2010.

- Hetta er ein fíggjarlig vanlukka fyri okkum øll, og tí má handlast nú, sigur reiðarafelagsformaðurin sum heldur, at sjálvur løgmaður eigur at taka hetta málið upp, so tað verður loyst.

Viberg Sørensen heldur tað vera langt úti, at føroysk skip fyri eina miljard krónur liggja bundin við bryggju, tí tey ikki hava loyvi at fiska føroyskan fisk í føroyskum sjógvi.

- Tað er ein ørgrynna av makreli fluttur inn á "trøðna" hjá okkum, sum reiðarafelagsformaðurin rópar føroyskt havøki.

Hann vísir á, at makrelurin leitar eftir mati, og hendan finnur hann í okkara sjógvi.

### Rímilig krøv

Viberg Sørensen heldur ikki nógv um tað, sum ein skoti, ið Kringvarpið tosaði við um dagarnar, sigur um ætlaninar hjá Føroyum at áseta egin kvotu á makrel í egnum sjógvi í 2010. Hesin hótti við "báli og brandi", sum reiðarafelagsformaðurin tekur til, um føroyingar váða sær at fiska føroyskan makrel í føroyskum sjógvi.

- Hetta er svárt at hoyra frá teimum, sum hava eyrænt okkara og íslendsku grunnarnar í út við 100 ár. Tað var eitt ódnartak hjá Føroyum og Íslandi at fáa sjómarkið út á 200 fjórðingar. Kríggj brast eisini á millum bretar og íslendingar, og fyri fyrstu ferð í søguni tapti Bretska Emperiið eitt kríggj.

Formaðurin í Reiðarfelagnum vísir á, at Føroyar í dag hava eina skipan, sum aðrir taka eftir.

- Tað, sum liggur í luftini í makrelmálinum, er, at Føroyar nú vilja hava tann partin av makrelstovninum, sum vit eiga. Parturin, vit gera krav uppá, er tilsamans ikki størri enn tað, sum skotar og es-menn alment viðganga, at teir tveita í havið aftur og annars yvirfiska á hvørjum ári, sigur hann.

### Eiga størri part

Viberg Sørensen sigur, at londini, vit hava samstarvað við um makrelin, eisi-ni viðganga, at Føroyar eiga ein størri part, enn vit hava fingið í undanfarnum avtalum.

- Men at lata okkum meiri, kemur kortini ikki upp á tal, leggur hann aftrat.

vilmund@sosialurin.fo

» ein ørgrynna av makreli er fluttur inn á "trøðna" hjá okkum

VIBERG SØRENSEN

# Kaj Leo og John

Vilmund Jacobsen

Sosialurin royndi fyrrapartin í dag at fáa viðmerkingar frá løgmanni, Kaj Leo Johannesen, nú formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, heldur, at løgmaður eigur at taka eina avgerð í makrelspurninginum.

Á løgmansskrivstovuni fingu vit at vita, at løgmaður í morgun hevur verið upptikin av vitjanin úr danska kongshúsinum.

Vit royndu eisini at fáa viðmerkingar frá John Johannesen, løgtingsmanni, sum er formaður í uttanlandsnevndini, men hann tók ikki telefonina, tá vit ringdu í morgun.

Tað var uttanlandsnevndin, ið líka sum álegði landsstýrismanninum, Jacobi Vestergaard, at taka upp politiskar samráðingar við Ísland, Noreg og ES um makrelspurningin, áðrenn nøkur endalig avgerð verður tikin í Føroyum um møguliga at áseta eginkvotu av makreli í føroyskum sjógvi fyri 2010.

Jacob Vestergaard hevur verið á fundi við íslendska og norska fiskimálaráðharran, men enn vantar fundurin við fiskivinnukommiserin í ES.

Í síðstu viku segði landsstýrismaðurin við Sosialin, at fundurin við fiskiveiðimyndugleikarnar í ES kanska verður 5. juli, men seinast, vit frættu, var ætlaði fundardagurin ikki endaliga ásettur.

Sosialurin fer til blaðið mikudagin at spyrja Jacob Vestergaard, hvør orsøkin er til, at hann ikki vil loyva Norðborg at fiska tey 2800 tonsini av makreli, sum lógu eftir frá 2009.